Tíðin stóra stríðsmálið

Føroya Lærarafelag vil hava meira tíð til næmingarnar, men tað kostar tí almenna kassanum nógvar pengar. Partarnir skuldu samráðast um nýggjan sáttmála allan gjár

EYÐUN KLAKSTEIN

Føroya Lærarafelag og Lønardeildin hjá Fíggjarmálastýrinum skuldu allan dagin í gjár fundast um nýggjan sáttmála.

Semingsmenninir, sum komu upp í leikin fyri einari viku síðani, útsettu tá ein møguligan arbeiðssteðg í eina viku. Og tað var til á midnátt í gjárkvøldi.

Fyrrpartin í gjár vildu partarnir ikki tosað við fjølmiðlarnar. Semingsmenninir høvdu givið pørtunum munnkurv.

Ætlanin var, at semingsmenninir skuldu leggja eitt semingsuppskot fyri partar í gjárkvøldið, og teir skuldu svara áðrenn midnátt. Um partarnir eftir midnátt framvegis vóru sinnaðir at tosa saman, skuldu samráðingarnar halda fram.

Stóru stríðsmálini í sáttmálasamráðingunum eru lønin og arbeiðstíðin.

Føroya Lærarafelag vil hava betri treytir til sínar limir. Fyrst og fremst vil felagið hava somu lønarhækking, sum onnur hava fingið, og síðani vil felagið hava, at lærararnir fáa betri tíð at fyrireika og samskipa arbeiði eftir nýggju fólkaskúlalógini. Hetta kann kosta tí almenna nógvar pengar.

Tíð kostar nógvar pengar

Formaðurin í Lærarafelagnum vildi í gjár einki siga um krøvini, men í Skúlablaðnum, sum Føroya Lærarafelag gav út í síðsta mánaði, gjørdi Elsa Birgitta Petersen greitt, hvat tað er, sum felagið fer at krevja frá Fíggjarmálastýrinum.

–Vit vilja ikki hava meira løn enn hini, men vit hava gjørt greitt, at kostnaðurin av tí, sum er lagt afturat okkara arbeiði, ikki skal takast av lønarhækkingini hjá okkara limum, segði Elsa Birgitta Petersen í Skúlablaðnum.

Lærararnir vilja hava meira tíð til næmingarnar, og hendan tíðin kostar pengar – kanska einar 60-70 milliónir krónur.

Karsten Hansen, landsstýrismaður við fíggjarmálum, hevur áður sagt, at um nýggja fólkaskúlalógin kostar so nógvar pengar, má hon broytast aftur.

Lærararnir og leiðslurnar á skúlunum eru ikki sinnað at fara aftur til eina gamla skipan, og tí stóðu partarnir langt frá hvørjum øðrum, tá farið varð undir samráðingarnar.

Drúgvar samráðingar

Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið hava verið í samráðingum síðani í heyst.

Beint áðrenn felagið skuldi fara í arbeiðssteðg 1. november í fjør, varð ein fyribilssemja gjørd, sum tryggjaði lærarunum eina ávísa lønarhækking. Tá varð avgjørt, at samráðast skuldi seinni um eyka arbeiði, sum nýggja fólkaskúlalógin hevur við sær.

Føroya Lærarafelag er sinnað at stríðast fyri sínum krøvum, og tað kann føra til arbeiðssteðg.

Um tað kemur so langt, verður tað fyrstu ferð, at fólkaskúlalærara fara í lógligan arbeiðssteðg.

Nevin var á lofti

Løgreglan í Havn fekk um vikuskiftið tvær fráboðanir um harðskap

SVEINUR TRÓNDARSON

Tað er ikki altíð, at tað er ætlanin men tað hendir seg kortini við hvørt, at so stór øði kemur í fólk, at nevarnir eru á lofti.

Um vikuskiftið fekk løgreglan í Havn tvær fráboðanir um harðskap í Club 20. Ein maður hevði ripað einum øðrum nevan beint frammaná so at nøsin brotnaði.

Í einum øðrum føri vóru tveir menn farnir at skeldast so mikið, at tann eini hevði skallað hin í vangan so at hann meiddi sær oyra.

Løgreglan sigur, at teir báðir, sum slógu og skallaðu vóru millum 25 og 35 ár.

»Men tað kann tykjast løgið, at fólk ikki duga sær hógv tá tey fara í býin og tað er sera óheppið, tá slíkt kemur fyri. Og sum oftast er tað kleyvarskapur« sigur vakthavandi.

Tríggjar liggjandi gestir

Sum vant hevði gistingarhúsið við J. Broncksgøtu eisini opið um vikuskiftið. Tríggir mans høvdu fingið so mikið innanborða, at teir vunnu upp hús ella teir vistu, hvar teir búðu.

Tí tók løgreglan menninar við á støðina har teir fingu eina song at sova í. Tá teir vóru klárnaðir so mikið dagin eftir, vórðu teir settir út aftur á gøtuna og tá mundi gangast betur at stýra heim til hús.

Ein tikin við kenning

Løgreglan í Runavík tók ein bilførara fyri at koyra við kenning um vikuskiftið.

Viðkomandi hevði eftir øllum at døma verið í gríluda í Kambsdali og hevði fingið í meira lagi innanborða.

Av støðini í Runavík frætta vit annars, at vikuskiftið har inni var serstakliga friðarligt í aðrar mátar.

Tíðarrit við skeivum upplýsingum

Um dagarnar kom tíðarritið »Rigsfællesskabets fremtid«, sum Edition ELKI-SP í Silkeborg gevur út, á gøtuna. Hóast teksturin er vælmeintur, so eru tølini í fleiri av greinunum, heilt við síðuna av. »Tað er sera óheppið og skal ikki koma fyri« sigur Erik Laugesen Kristensen, blaðstjóri

SVEINUR TRÓNDARSON

Tølini, sum verða brúkt í tíðarritinum »Rigsfællesskabets fremtid« eru heilt burturvið. Tað er eftir øllum at døma komið bland í grønlendsku og føroysku tølini uttan at greinskrivarin hevur uppdagað tað. Hann endurtekur somu tøl í aðrari grein inni í blaðnum

Um dagarnar kom blað nummar tvey í røðini og tað fyrsta blaðið í ár av »Rigsfællesskabets fremtid«, sum forlagið Edition ELKI-SP í Silkeborg gevur út, á gøtuna.

Tíðarritið er skrivað av fólki, sum taka undir við ríkisfelagsskapinum og er eisini ætla at fáa fólk at fara betri um felagsskapin enn gjørt verður í løtuni.

Kortini hava vit fest okkum við, at ein partur av talskjalaprógvunum í høvuðsgreinini eru skeiv. Í greini, sum høvundin kallar »Selvstændighed i Rigsfællesskabet«, sigur Erik Laugesen Kristensen, at danski ríkisstuðulin til Føroya er 2,5 mia. krónur og at føroyska fíggjarlógin er upp á 5 mia. krónur.

Hesi tøl eru skeiv og tí ringdu vit til Erik Laugesen Kristensen og gjørdu hann varugan við mistaki. Samstundis spurdu vit hann um hann metti tað gagna kjakinum at brúka skeiv tøl

»Tað sigur seg sjálvt, at tað ger tað ikki. Sjálvandi skulu tølini vera røtt, og eg skilji ikki, at tey eru so langt við síðuna av«, sigur hann.

Hann vildi kortini ikki avdúka hvaðani hann hevði tølini í greinini. Hann segði tó, at hann fór at rætta tølini inni á heimasíduni hjá tíðarritinum. Tað hava vit staðfest, at hann hevur gjørt.

Serstakliga óheppið

Vit ringdu eisini til Høgna Hoydal, landsstýrismann í sjálvstýrismálum og bóðu hann um eina viðmerking.

»Tað er serstakliga óheppið, at teir brúka skeiv tøl. Tølini, sum teir hava brúkt í hasi greinini hava als ikki hald í veruleikanum«, sigur Høgni Hoydal, sum heldur, at tað kann skaða kjakið millum fólk, at upplýsingarnar, sum vera lagdar fram í einum slíkum tíðarritið eru skeivar.

»Hyggja vit at fíggjarlógini fyri í ár, so síggja vit, at vit bókstaviliga hava sett meginpartin av blokkstuðlinum á bók, og tí er tað beinleiðis ósatt, at tað fer út um nýtsla« sigur Høgni Hoydal.

Hann leggur afturat, at hevði høvundin ómakað sær at hugt eftir føroysku fíggjarlógini, ella bara spurt um hana, so hevði hann fingið rættar upplýsingar.

Um dagarnar frættist, at yvirskotið á fíggjarlógini seinasta ár var góðar 700 mió. krónur og tað er í sær sjálvum nakað heilt fyri seg heldur Høgni.

»Tað merkir, at høvdu vit ikki tað serliga stóru skuldina, so kláraðu føroyingar seg í fjør uttan blokkstuðlin« sigur landsstýrismaðurin.

Kenna ikki veruleikan

Tað, sum Høgni heldur er óheppið er, at fólk, sum fara í holt við at skriva tilfar um ríkisstuðulin, ikki vita hvat tey skriva um.

»Hevði hann spurt hjá okkum, so fekk hann røttu upplýsingarnar, men tað hevur hann ikki gjørt. Men hann er ikki tann einasti, sum er fallin í hasa veitina« sigur Høgni Hoydal.

Hann vísir á, at formaðurin í Ráðgevandi nevndini Arne Larsen eisini hevur brúkt skeiv tøl tá hann hevur úttalað seg, og hann skuldi í hvussu er vita, hvat hann tosar um.

»Tað keðiliga er, at fólk lurtar eftir teimum og trúgva teimum upplýsingum teir koma við, og tað er tað sum kann skaða kjakið og tað kann ikki verða meiningin« sigur Høgni Hoydal.

Oljuvinna við til at menna vinnulívið umhvørvisliga

-Oljuvirksemi kann verða við til at geva føroysku fyritøkunum eitt skump soleiðis, at tær umhvørvisliga mugu fáa viðurskiftini uppá pláss. Hetta vil so eisini gera tær førar fyri at fara út á marknaðin við einum meira grønum profili. Á henda hátt kann oljuvinnan verða við til at menna føroyska vinnulívið umhvørvisliga segði Jacob Pauli Joensen, leiðari fyri umhvørvisdeildini á Heilsufrøðiligu Starvsstovuni

JAN MÜLLER

Teir fimm luttakararnir í panelinum frá fundinum um oljuríkikiðømi og samfelagslig árin. Fv. Herálvur Joensen, Jacob Pauli Joensen, Jákup í Dímun, Jan Müller og Kjartan Hoydal. Mynd Álvur Haraldsen

Ringa veðrið hósdagin varð orsøkin til, at fleiri týðandi fundir kring landið vórðu avlýstir og útsettir. Ein teirra, sum Suðurstreymoyar Tjóðveldisfelag tók stig til - um oljuríkidømi og samfelagslig árin - varð hildin fríggjakvøldið í staðin. Hetta er ikki besta kvøldið til slíkar fundir, og tískil vóru bert fá fólk møtt upp. Hetta var spell, tí talan var um ein heilt øðrvísi panelfund, har politikarar høvdu møguleikar at seta einum paneli við oljufólki, journalisti oø. spurningar.

Millum panelluttakararnar var eisini Jacob Pauli Joensen, sum stendur á odda fyri umhvørvisdeildini á Heilsufrøðiligu Starvsstovuni og sum í dag eisini er partur av umhvørvisarbeiðinum í Oljumálastýrinum. Hann helt eitt sera áhugavert innlegg, sum blaðið prentar í fullum líki. Ætlanin er at venda aftur til teir ymsu spurningarnar, sum komu fram undir hoyringini í útvarpshøllini hetta vetrarkvøld.

Jacob Pauli Joensen segði:

-Eg eri boðin at siga okkurt um umhvørvi í samband við tað komandi oljuleitingina og hvussu hetta kann koma at ávirka samfelagið. Mín boðskapur er nokk - at tað er ein grundleggjandi tørvur á umhvørvisfyrisiting í Føroyum og - at ein oljuvinna kann verða við til at menna umhvørvistilvitanina.

Vørumerki

Seinastu nógvu árini hava føroyingar víst á, at fiskurin úr Føroyum verður fiskaður úr heimsins reinasta havi. Hetta er ikki heilt rætt, men hetta hevur borið til, tí vit liggja so fjart frá teimum londum, sum eru okkara marknaðir, og við tí vaksandi tilvitanini um matgóðsku hevur hetta óivað havt týdning fyri søluna. Hetta vørumerkið kann rættuliga koma at standa sína roynd, um Føroyar í framtíðini verða assosieraðar við olju og oljuríkidømi.

Vit standa í dag á gáttini til at móttaka eina vinnu, sum er okkum heilt fremmand - oljuvinnan. Hetta er ein multinational vinna, sum ikki kann sigast at verða rótfest í Føroyum. Eisini hendan vinnan hevur hesi seinastu árini skilt boðskapin frá brúkara- náttúru- og umhvørisverndarfeløgum í Europa og í norður-Ameriku og leggur dent á at fáa eitt grønt - umhvørvisvinarligt - image.

Olja og oljuleiting hevur í nógv ár verið ímyndin av tí dálking, sum allur heimurin er merktur av. Myndir av deyðum fuglum og hópin av fólki, sum lempa oljuevju upp av strendum, av stórbýum, sum eru um at kødna vegna nann nógva bilosan, og til dagsins stóru umhvørvistrupulleikar - veðurlagsbroytingar - hava allir tilknýti til nýtsluna av olju.

Umhvørvisraðfesting

Tað kann tí fella mongum fyri brósti at hoyra, at umhvørvismál eru løgd undir Oljumálastýrið. Men, at hetta er gjørt, kann skiljast soleiðis, at tað ber ikki til at tosa um at fara ígongd við oljuleiting, uttan at øll umhvørvisviðurskiftini eru fingin uppá pláss eisini. Hetta hevur sami ráðharri ábyrgd av, og tað kann hava sínar fyrimunir. Hetta kann eisini síggjast sum eitt tekin um, at umhvørvisverndin í dag hevur fingið eitt sjálvstøðugt pláss í tí føroysku fyrisitingini og tí eins væl kann liggja saman við olju sum við aðrari vinnu.

Størsti trupulleikin er, at umhvørvisvernd ongantíð er blivin ein berandi partur av føroyskari fyrisiting. Hóast nýggj umhvørvisverndarlóg varð sett í gildi í 1988, hava umhvørvismál fyrst og fremst verið roknað sum kærumál eins og í tí gomlu skipanini við kommunalum heilsunevndum.

Ætlanin við umhvørvisverndini er tó fyrst og fremst, at øll planlegging, nýgerð og broytingar eru grundað á umhvørvisligar metingar, hetta fyri at fyribyrgja trupulleikum. Í londunum kring okkum hevur umhvørvið leingi staðið sera frammalaga. Danska umhvørvisstýrið hevur skjótt 30 ár á baki, og í seinastu víku hevur íslendska umhvørvisráðuneytið sítt 10 ára jubileum.

Hvat er so orsøkin til, at umhvørvisverndarlógin ongantíð er komin til sín rætt her hjá okkum? Eg havi tvey boð: tann skipanarligi tørvurin og tann fíggjarligi tørvurin. Vit hava í dag 3 vinnumálastýri: Fisk, Olju og aðra Vinnu, men einki Náttúru- ella Umhvørvismálastýri. Vit høvdu einaferð eina løgtingsins umhvørvisnevnd, men hendan varð avtikin, tá nýggj bygnaðurin kom í Landsstýrinum. Og at meta eftir teimum fíggjarligu umstøðunum til fyrisiting av náttúru- og umhvørvisvernd, so er hetta fyrisitingarøkið eftir øllum at døma óneyðugt.

Nú skal beinanvegin sigast, at tað eru ítøkilig tekin um, at umhvørvisverndin í dag hevur størri áhuga. Tað hevur t.d. verið uppá tal at vekta umhvørvið soleiðis, at Oljumálastýrið fekk heitið Umhvørvis- og oljumálastýrið. Nýggj havumhvørvislóg varð sett í gildi í heyst, og umleið 15 kunngerðir eru nú ávegis, sum have tilknýti til havumhvørvislógina. Eisini hevur landsstýrismaðurin í umhvørvismálum avgjørt at niðurseta ein arbeiðsbólk til at gera uppskot til ein umhvørvispolitikk. Harafturat er meira vanligt í dag at senda mál til hoyringar hjá áhugabólkum, t.d. hevur tað verið ein hoyring fyri fiskivinnufeløg og náttúruverndarfeløg, áðrenn útbjóðingarlógin varð løgd fyri tingið, og tað eru eisini ætlanir um at senda onnur mál til hoyringar.

Oljan

Tað, sum er aktuelt, er, hvørjar umhvørvistrupulleikar ein oljuleiting kann føra við sær. Tað er greitt, at ein boring vil hava fleiri útleiðingar í sjógv og luft við sær. Afturat teimum vanligu spillvatnsútleiðingunum og roykútleiðingunum eru útleiðingar av borispónum, altso tað, sum kemur upp, tá borað verður. Knýtt at hesum borispónum er borimóra, sum kann innihalda rættuliga nógv ymisk kemisk evnir. Eisini eru stórar nøgdir av burturkasti frá virkseminum, sum alt skal førast í land til burturbeiningar.

Roknað verður ikki við teimum nógvu boripallunum tey fyrstu árini og vil dálkingin frá rakstrinum tí verða rættuliga avmarkað. Tað eru sjálvsagt altíð vandar fyri óhappum, sum í eini óhepnari støðu kunnu geva stórar dálkingar, her verður hugsað um oljulekar ella brand.

Vit hava longu havt teir fyrstu fundirnar við oljufeløg, har tey fregnast eftir teimum umhvørvistreytum, sum roknast kann við, og har tey hava víst á, hvør teirra umhvørvisligi kunnleiki og dygd er. Vit meta tað alneyðugt, at feløgini hava eina vælvirkandi innaneftirlitsskipan, sum er undir eftirliti frá óheftum felag. Vit taka tað somuleiðis sum givið, at feløgini ikki fara undir virksemi fyrrenn umhvørvisgódkenning er fingin uppá pláss. Somuleiðis skulu onnur viðurskifti verða fingin uppá pláss, so sum umhvørvisligar árinsmetingar og tilbúgvingarætlanir.

Virkir

Størsta árin frá oljuvirkseminum kann koma at verða dálking frá tí virksemi, sum verður skapt á landi í tilknýti til oljuleitingina. Nærum alt virksemi er í dag uttan tað umhvørvisgóðkenning, sum er ásett í umhvørvisverndarlógini. Harafturat kemur, at ein vøkstur í virkseminum eisini merkir størri nøgdir av burturkasti og útleiðingum í sjógv ella luft. Skal hetta tálmast, má meira orka nýtast til umhvørvisgóðkenningar og til at minka um burturkastnøgdirnar. Nýtsla av avgjøldum fyri at minka nýtsluna og dálkingina og fyri at fíggja umsitingina verður at kalla ikki brúkt í Føroyum, hóast tað er sera vanligt aðrastaðni.

Vit eru ikki illa fyri umhvørvisliga í Føroyum, men vit mangla yvirhøvur at fylgja við í rákinum og gera vart við tær dygdir vit hava og eisini fáa loyst teir umhvørvistrupulleikar vit hava. Vit mugu rokna við, at vit verða oftari og oftari spurd eftir teimum umhvørvisligu umstøðunum. Vert er kanska eisini at nevna, at niðurstøðan hjá dønum í dag er, at teir eru glaðir fyri ta menning av umhvørvistøkni og tann marknaðarfyrimun teir hava fingið við at eina skjótir úti við dálkingarfyribyrgjandi tiltøkum í vinnuni.

Vit kunnu koma at uppliva, at oljufeløg, sum eru von við at hava greiðar mannagongdir fyri umhvørvisvernd sum ein neyðugan part av virkseminum, koma at vísa á tað ósamsvar, sum er í millum tað vit vænta av teimum og tann umhvørvisliga hugburðin tey møta á nógvum føroyskum virkjum og skipum.

Tað ber sostatt til at siga, at oljuvirksemi kann verða við til at geva føroysku fyritøkunum eitt skump soleiðis at tær umhvørvisliga mugu fáa viðurskiftini uppá pláss. Hetta vil so eisini gera tær førar fyri at fara út á marknaðin við einum meira grønum profili. Á henda hátt kann oljuvinnan verða við til at menna føroyska vinnulívið umhvørvisliga.

Tað eru yvaleyst nógvar aðrar broytingar ein oljuvinnu vil hava við sær. T.d. hava vit leingi verið í støðuni sum offur fyri dálking uttanífrá, serliga tá hugsað verður um trupulleikarnar við grindini. Um vit finna olju, fáa okkara umhvørvisreguleringar munandi størri týdning fyri dálkingina í øllum heiminum. Vilja vit tá verða eitt frríøki uttan ov nógvar reguleringar, út frá eini gamlari fatan av, at umhvørvisvernd bara kostar, ella vilja vit tá krevja størsta umhvørvisansni, tí vit liva eisini av havinum.

Vit mugu minnast til, at oljan er eitt avmarkað tilfangi. Tí er umráðandi, at vit halda havið ódálkað og varðveita ímyndina av, at føroyskur fiskur stavar frá heimsins reinasta sjógvi.

Skuldi eg givið eitt boð uppá, hvat skal gerast fyri at hindra ov stórum umhvørvisligum og samfelagsligum avleiðingum av eini oljuvinnu, so er tað at steðga onkrari av teimum stuðuls- ella fløguætlanum, sum eru uppá tal og nýta orkuna til at fáa greiðar málsetningar og mannagongdir fyri náttúru- og umhvørvisverndina og fyri hvussu øll samfelagsøkir kunnu gerast umhvørvisliga burðadygg.

Samanumtikið er mín boðskapur, at umhvørvisfyrisitingin er alt ov veik í dag, og skal ímyndin av Føroyum sum verandi reinar og ódálkaðar varðveitast, so mugu munandi broytingar gerast. Eisini er mín boðskapur, at hóast oljuvinnan er ein ímynd av dálking um allan heim, so kann ein vættilrættisløgd leiting og framleiðsla verða við til at menna umhvørvistilvitanina í Føroyum.